# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a Tingskipanini

**Spyrjari**: Bjarni Hammer, løgtingsmaður

**Svarari**: Jóhan Christiansen, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

**Evni**: Vegagerð í Suðuroynni

**Spurningur**:

1. Hví er einki gjørt við vegaføringina úr Hvalbiartunlinum til Trongisvágs, hóast játtan varð oyramerkt til endamálið á fíggjarlógini fyri 2022?
2. Hví er einki gjørt við gongubreytina í Trongisvági/Líðini, hóast játtan varð oyramerkt til endamálið á fíggjarlógini fyri 2022?
3. Nær verður Froðbiarvegurin gjørdur liðugur?
4. Hvørjar heimildir hevur Landsverk at raðfesta aðra vegagerð enn tað, sum er ásett við lóg?

**Viðmerking:**

Beint fyri jól fyri fýra árum síðani – í desember 2021 – varð fíggjarlógin fyri 2022 samtykt. Vit, sum sótu í Løgtinginum tá, samtyktu millum annað 4 mió. kr. til at breiðka vegin úr Hvalbiartunlinum til Trongisvágs. Vit samtyktu eisini 2 mió. kr. til at breiðka Froðbiarvegin, og 1 mió. til gongubreyt í Trongisvági. Hesar verkætlanir høvdu til endamáls at bøta um ferðslutrygdina á hesum vegastrekkjum.

Nú fýra ár seinni kunnu suðuroyingar staðfesta, at einans er byrjað upp á Froðbiarvegin av hesum arbeiðum. Froðbiarvegurin varð breiðkaður í vár, men vegurin er enn ikki asfalteraður. Tað hevur ført við sær, at bilar við jøvnum millumbilum fáa skaða av manglandi asfaltering. Hini eru ikki eingongd byrjaði. Almenna umrøðan í vikuni hevur víst, at Landsverk av sínum eintingum er farið ímóti Løgtingsins vilja, og hevur stovnurin brúkt peningin í heimildarloysi til heilt aðrar verkætlanir norðanfyri.

Tað er sjálvandi ikki í lagi. Vit vita øll, at tá Løgtingið viðger fíggjarlógina, so verða semjur gjørdar millum flokkar, ofta tvørtur um samgongu og andstøðu, fyri at fáa semju um fíggjarlógina, sum er sjálvt grundarlagið fyri øllum politikkinum í einum samfelag.

Vegurin úr Hvalbiartunlinum, vegurin í Froðba og gongubreytin í Trongisvági/Líðini vóru partur av semjuni um og grundarlagið undir fíggjarlógina fyri 2022.

Ein stovnur kann ikki av sínum eintingum tileinkisgera eina politiska semju, sum er ásett í lóg.

Fyri at fáa greiðu á hesum máli setur undirritaði landsstýrismanninum í fiskivinnu- og samferðslumálum, Jóhan Christiansen, hesar spurningar.

**Á Løgtingi, 19. november 2025**

Bjarni Hammer